# Vinkonan Tomasia

**Tomasia var eitt sindur øðrvísi enn onnur bygdarfólk. Hon búði fyri seg sjálva og var sera barngóð og fyrikomandi, háost orðalagið var eitt sindur sjáldsamt til tíðir**

JOHN S.MYLLHAMAR

Fyrstu ferð eg minnist meg hava sæð Tomasiu, var eitt kvøldið nótakast var. Sum lítil óviti var eg sloppin oman í fjøruna í skýmingini at hyggja at, meðan pápi og aðrir bygdarmenn kastaðu nót. Náttarkuldin gjørdi vart við seg, og pápi leiddi meg inn til hennara. Spurdi hana, um eg kundi sita eina løtu og verma meg, meðan hann fór oman aftur í fjøruna til hinar; teir skuldu gera seg lidnar við seiðin og fáa nótina til høldar aftur.

Saman við manninum og einum ógiftum soni, búði hon í býlinginum niðri við sjógvin. Umframt sonin, áttu tey eina dóttir gifta í útlondunum. Tey tjøraðu húsini, sum einaferðí tíðini høvdu verið handil, stóðu kroyst millum neyst og pakkhús einar hálvthundrað metrar niðan frá støðni. Eisini stóðu tey heldur árent; trappan stakk nakað út á vegin, sum gekk norð til bryggjuna og handilin. Ferðslan var tí nógv tætt fram við teimum, bæði akfør og fólk. Útnyringshornið, har vegurin lá, var byrjað at sjúnka, tí mórulendi var undir. Við árunum gjørdist hallið størri og sjónskari, so tað sást ein lítil mótbrekka á gólvinum frá køkshurðini yvir móti komfýrinum.

Maðurin og sonurin vóru sjómenn. Hin eldri var tó longu uppilagstur, fyrst eg minnist hann. Hann tókst við vanligt heimaarbeiði. Umframt gæs, dunnur og høsn, høvdu tey kúgv, ross og seyð; tí fitt av jørð var í húsinum. Teir vóru eisini ánarar í báti saman við øðrum bygdarmonnum.

Tomasia sjálv var eitt satt konubrot, greflig í andlitið við mannligari rødd, og fell henni mannfólkaarbeiði líka lætt og náttúrligt sum konufólkaarbeiði. Ikki var óvanligt tá ið fólk komu upp um morgnarnar, at síggja hana standa við kvísl undir knø ytst við sjóvarmálan og fylla tara uppí vognin, meðan aldurnar skolaðu niðan móti henni. Fleiri vóru teir menn, ið ikki heftu fyri henni.

Annars ambætaði hon kríatúrum, gekk til neytar, setti niður og tók upp eplir og var úti í hoyggj. Burturi í torv var fast at hon kyndi eld og kókaði drekka. Onnur, sum eisini vóru á heiðini, leitaðu sær onkuntíð yvir til hennara at fáa ein heitan munn. Hon hevði ríkiligt við sær av øllum.

Eitt skiftið bakaði hon breyð at selja. Nøkur hús í bygdini keyptu fast frá henni. Ikki vóru breyðini altíð bakað, tá ið óvitarnir komu eftir teimum. Teir máttu tí bíða uttanfyri, inntil hon lat vindeyga upp og rópti: Nú er bakað! Síðan fóru teir, hvør við sínum breyði undir arminum til hús.

Tá ið árini komu, helt hon tað vera heldur ófriðaligt fyri seg at búgva niðri við sjógvin, har mesta virksemið í bygdini var. Tey ungu flokkaðust ofta niðri millum neystini um kvøldarnar: Har var sovorðin beistalevnaður út á náttina, plagdi hon at siga. Nakað eftir at systir hennara doyði, keypti hon húsini hjá henni og flutti niðan hagar. Hesi lógu í einum býlingi longri uppi í bygdini. Ein heldur long flagtakt lon, við hoyggjhúsi í eystara enda, og fjósi niðan úr vestara enda. Stutt var millum hesi húsini og mítt barnaheim, og kom hon tí, at gerast ein av mínum grannum.

Tað fyrsta, eg hevði við Tomasiu at gera, eftir at hon var flutt niðan í bygdina, var eitt kvøldið, eg um seks-sjey ára aldur kom til hús, eftir at hava spælt úti. Mamma var ikki inni, og sum tann mammudrongur, eg var, fór eg alt fyri eitt út at leita. Tá ið eg ikki fann hana beinanvegin, fór eg grátandi runt býlingin. Kom eisini í sjóheitum gráti framv ið húsunum hjá Tomasiu. Hon bresti vindeyga upp á bak og spurdi:

– Hvat er á vási, er nøkur ólukka hend?

– Ja, mamma er blivin burtur! svaraði eg.

Snakka nú skilasnakk, stakkalin, rópti hon, hvar burtur skal hon vera! hon sløðist onkustaðni nærhendis, kom inn og set teg eitt eygablikk!

Men eg var ikki til at troysta.

Í uppvøkstrinum vitjaði eg tíðum inn til hennara. Hon visti frá nógvum at siga. Dugdi eisini væl at reka fram undir, tá ið okkurt slatur gekk í bygdini, kom við hesum hálvkvødnu vísunum, fyri at fáa meg at leggja út. Sjálv latst hon bara at hava franir av onkrum, tað vísti seg kortini at hon visti alt, tí segði eg einki, kom hon sjálv fram við onkrum.

Fólk kundu ikki koma uttan um, at leggja merki til, tá ið hon tosaði ella fekst við eitthvørt. Málburður hennara var egin, somuleiðis atburður hennara. Hon brúkti sjálvsom orð og bar tey fram á serstakan hátt. Tók altíð rívan til, ongantíð við ljótum orðum, men við margháttligum orðalagi og vendingum; og við sínum serligt frábregðandi eyðkennum, keipaði hon sær við ørmum og munni tá ið hon spurdi ella meðan hon segði frá.

Soleiðis eisini tá iðhon tókst við eitthvørt arbeiði. Fekst hon við slakt og tílíkt, setti hon føt, trog og spannir mitt á roykstovugólvið. Gjørdi hon blóðpylsu ella súltaði, fleyt alt inni. Ongantíð helti hon passandi í føt og spannir, nei, íløtini vóru á tremur ella flutu yvir. Sjálv gekk hon og vóð uppií. Vatn var ikki lagt inn tey fyrstu árini, men ein krani var úti í fjósinum, og lakjan, flestu fólk í býlinginum brúktu, var beint niðan fyri húsini.

Onkuntíð sá tú hana standa uttanfyri og bróta pinnabrenni sundur, tunnustavar og annan rekavið, sum komin var uppá land í onkrum landnyringsbrimi, og sum sonurin hevði borið niðan. Legði annan endan á fjølini upp á einari hellu, tók so ein tungan stein, lyfti hann yvir høvd og ripaði hann niður á fjølina, so hon kvettist av.

Grannastevna var fyri henni ein stórhending í bygdini. Kundi liggja útav vindeyganum um morgunin og rópa: Hvussu, fer tú inn? Man smoyggir sær avstað einaferð. tá ið gongd er komin á fólk! Har sat hon so mitt millum alt mannfólkið og gjørdi vart við seg í málum, sum høvdu hennara áhuga. Meira enn so kom hon í kjak við onkran.

Hóast sjeyti ára aldursmun, vóru eg og Tomasia vinir. Sum óviti og í uppvøkstrinum, fekk eg mangan drekkamunnin frá henni. Ein stórur ketil, ið skuldi eitast at vera bláur, plagdi standa og brima úti á komfýrinum. Tá ið tú kom inn, sat hon sum hon var von á tí stóra torvkassanum, sum rakk heilt oman í veggin. Komfýrurin var øðrumegin hana, hinumegin var lagað ein rúgva av klæðum upp móti bróstinum. Oftast sat hon við stokkum, annars karaði og nappaði hon, ella hon tøvdi okkurt plaggið. Aðrar løtur stóð hon við vinstra armi yvir høvd frammanfyri roykstovuvindeyganum og spann viðtí stóra rokkinum. Um ein mús spældi rundanum føtur hennara, gav hon tí ikki gætur, metti hana ikki ørvísi enn eitt vanligt húsdjór. Onkuntíð kundi henda, at hon lá og durvaði niður á klædnarúgvuna við føtrunum móti komfýrinum, tá iðt ú kom inn. Altíð var hon í hálvhosum og einum ella tveimum pørum av skóleistum uttaná. Í staðin fyri varmadunk, brúkti hon eina stóra geneverleirkrukku, sum hon fylti við kókandi heitum vatni og legði undir dýnuna, áðrenn hon fór at leggja seg um kvøldið.

– Hetta heldur sær út á hálva náttina! segði hon.

Hon hoyrdi til har í roykstovuni, hevði líkasum sama lit, sum alt, ið inni var.

Eftir at tú hevði staðið eina løtu á gólvinum, lat hon hurðina á komfýrinum upp, tveitti nakrar torvkonglar inn í eldin. Tú visti at nú fór hon at stákast við drekka.

Tað hvein í træhongslunum, tá ið hon hvarv gjøgnum hurðina innar í kovan. Eitt lítið bil gekk, kom so út aftur viðhálvpottakrússi í aðrari hondini og pulvurmjólk í hinari. Gjørdi tummulin vátan í munninum og tók hann eftur tromuni á krússinum, pískaði pulvur og vatn saman, setti tað á komfýrshornið. Við báðum hondum um honkina lyfti hon ketilin uppúr eldholinum. Skonkti við tesílu í krússið. Tók eitt blikk við melisi niður av hillini, oysti einar 4 stórar teskeigir útí, rørdi aftur, smakkaði á og helt fyri: Nú er tað passaligt, boyða teg niður, stakkalur, og hvølv hendan munnin í teg!

Dúkur, skálir og: ger so væl! hoyrdi ikki heima inni hjá henni - hevði heldur ikki rigga. Reinførið gevur barnið sær ikki altíð far um. Soleiðis átti at vera inni hjá henni, hvørki eg ella hon høvdu viljað havt tað øðrvísi.

Tú kundi ikki lata vera at leggja merki til eitt sera stórt vaflujarn, sum stóð á beinkinum. Tá ið hon bakaði og vendi tí á komfýrinum, gróv tað seg niður í eldholið og tók gløður og øsku við sær uppá ringarnar. Á borðinum plagdi at standa eitt stórt, enskt karramellublik fult av vaflum, tær vóru sum manshendur, men sera væl dámdi mær tær.

Einaferð var ein vinmaður komin viðmær at vitja hana. Hann var nógv minni enn eg. Eisini var hann heldur pjakutur og át seint. Hon skar okkum hvør sína breyðflís við rullupylsu uppi á, og skonkti okkum hvør sítt krúss við rabarbuvíni afturvið. Flísarnar vóru tríggjar ferðir tjykkri enn vit vóru vanir við, so vinmaðurin hevði ilt viðat gapa um tær. Eg sat og eygleiddi hann, meðan hann tugdi. Mær tókti synd í honum, tað sást týðiliga, at hann troystaði sær ikki, men tordi heldur ikki at leiva. Sat og hugsaði í mínum óvitasinni

– Hvat um nú kjálkabeinið fer úr lið, tá ið hann býtur um flísina, so verður synd í honum.

Tað eydnaðist mær einaferð, hon hugdi burtur, at fáa hann at stinga breyðflísina í lumman, uttan at hon varnaðist.

Onkuntíð kom eg inn, meðan hon var í ferð við at seta døgverða útá. Hon hevði eina grýtu, har onnur honkin var dottin av. Helti nøkur eplir úr einari spann, sum stóð undir beinkinum í hana, oysti heitt vatn úr ketlinum útyvir, risti síðan eitt sindur í hana, koyrdi ein neva av grovum salti í, og setti út á. Einki við at vaska eitt og eitt epli. Ikki var døgurðin serliga fjølbroyttur hjá henni, heldur enn hjá mongum øðrum. Tað sama hon koyrdi í grýtuna hvørjaferð, einar tríggjar ræstar seiðir, eina bruknaða brosmu, ella ein grindabiti. Onkuntíð hevði hon ein bukaðan turran fisk aftur við heitum eplum og salttálg.

Tað hendi seg at hon vísti mær innar í fínustovu, sum var í vestara enda. Eg helt at tapetið mundi vera tað vakrasta í heiminum, hvítt viðreyðum blomstrum og grønum bløðum. Rúmið var umleið 5 alin í fýrkant, men í míni barnaverð var tað ein veldig marglætishøll. Systir mín plagdi at rópa hesa stovuna Sorgenfri, segði hon og flenti hart. Úr einari stórari kistu, sum stóð í einum horni á gólvinum, dró hon fram stakkar, kjólar og frakkar í ymiskum litum at vísa mær.

– Hygg, sært tú stásið! segði hon.

Ja, tað helt eg eisini. Hetta er svenskt, helt hon fram. Tá ið man letur seg í sovorði, sær man út sum ein dronning. Annars hevði eg ongantíð sæð hana í nøkrum øðrum enn tilpjøssaða í sama dimma skjúrtinum, einari myrkamorreyðari troyggju og stórum seyðalittum bundnaturriklæði vavt um seg.

Hóast hon ikki var av mínum ættarliði, sum rann til handils fleiri ferðir um dagin, undraði tað meg hvussu lítið, hon keypti inn. Minnist meg ongantíð vera ørindi fyri hana. Sjálv kom hon nærum aldri til handils, eftir at hon var flutt niðan í bygdina. Feðgarnir vóru verandi eftir í hinum húsunum. Sonurin var burtur alt summarið. Maðurin, hóast hann var fleiri ár yngri, doyði eini tólv ár áðrenn hon. Hann var illa gongdur ta seinastu tíðina, so tað vóru bara smáting, hann keypti fyri hana. Hennara innkeypsháttur hevur verið á annan hátt enn okkara. Kortini var hon nøgd. Gramdi seg aldri, hvørki um illsku ella, at henni tørvaði nakað.

Tók hon, sum áður nevnt, ógvisliga og ríkiliga til, var hetta eisini galdandi hennara gávumildni. Hon var ikki pírin tá iðhon gav tær okkurt. Var tað eplir, turrur seiður, tálg ella okkurt annað, fylti hon uppí blikkkassar ella posar, so tað var roki omaná

– Hygg, tak og tveit hetta smátingið inn til mammu tína, segði hon.

Mutaði eg ímóti, at hetta var alt ov nógv, svaraði hon:

– Skammast, hvat nógv er hatta, einaferð í munnin. -

Hon hevði ein garð við páskaliljum, runnum, grønleyki, rabarbum og ymiskum øðrum. Fólk, sum komu framvið, tá ið hon var í garðinum, kundu gerast sera skakk. Uttan at tey vistu av, kundi hon tveita eitt bunti av rabarbum beint á tey: Hygg, tak hetta við tær til hús!

Ein dagin, eg kom at vitja hana, skein á hvørjum spreki. Hon hevði vaskað upp og niður, tí dótturin, sum búði í útlondunum, skuldi koma heim at vitja.

Tað var vorðið so ljóst og tómligt inni. Øll íløt vóru tikin av beinkinum. Pottar og spannir flutt útum, og klædnarúgvan á torvkassanum beind burtur. Tað sindrið, sum eftir var í roykstovuni, var sett uppá pláss. Tvøga og grønsápa hevði verið á øllum og tváað tann kenda, serskilda húsluktin, sum átti at vera inni, burtur. Eisini var hon sjálv broytt. Andlitið var reint og bleikt, ja, tað bar á líkdæmi; hárið var eisini øðrvísið enn tað átti at vera.

Einki var um hana hendan dagin, sat eins og fuglur, ið hevur fingið reiður sítt avoytt, svaraði so dánt aftur, tá ið eg spurdi um okkurt. Taðtyktist sum hon var kedd um, at alt var farið av lagi inni. Mær dámdi hetta heldur einki, var eisini keddur, kendi tað eins og tjóvar høvdu verið og rænt alt frá henni. Eg støðaðist ikki - fór mín veg.

Nakrar vikur seinni vitjaði eg aftur inn til hennara. Dóttirin var longu farin avstað aftur. Enn var heldur ruddiligt inni, heldur tómt. Men sum fráleið byrjaði alt at koma í rættlag aftur, soleiðis, sum eg vildi hava tað at vera, og soleiðis sum hon vildi hava tað, og soleiðis sum tað átti at vera inni hjá henni. Bonkurin byrjaði at fyllast aftur við spannum, grýtum og pottum. Klædnarúgvan aftan fyri hana á torvkassanum, tók so smátt at vaksa aftur. Grønsápulukturin dovnaði, og hin kendi húslukturin, kom aftur. Andlitið fekk aftur hitt rætta øskulitta dæmi, sum tað átti, og hon spurdi og segði frá sum hon var von. Nú kendi eg meg aftur, nú var alt komið aftur í rættlag.

Eftir at eg var fermdur og fór til skips, gjørdist longri millum vitjaninar inn til hennara, kortini royndi eg hvørja ferð, eg var heima, at gloppa hurðina hjá henni.

Tá ið eg fór niður á skúla, var eg inni á gólvinum og segði henni farvæl. Hon var tá úti við 100 ár og lá í seingini. Framvegis var hon hin sama og hevði sama minnið sum altíð. Blandaði kanska eitt sindur, men einki av týdningi. Vit prátaðu um ymiskt, og hennara áhugi fyri hvat hendi í bygdini, var tann sami. Segði henni, at eg fór niður til Danmarkar á skúla, og kom at vera burtur nakað leingi. Tá vendi hon høvdinum á og hugdi uppá meg. So kom hon inn á nakað, sum hon ongantíð áður hevði nevnt øll árini, eg hevði kent hana og vitjað hana.

Á hátíðarligan hátt og við drottningatign, bar hon fram sín einfalda, men djúpa og rørandi vitnisburð, um sína trúgv á hin alvalda, at við hansara hjálp og verju, var hon komin gjøgnum lívið, hann hevði fylt henni bæði í góðum og vándum døgum. Hann var tann, hon leitaði til hvønn morgun og hvørt kvøld. Hóast hon, líka lítið sum eg sjálvur, hevði eitt lýtaleyst lív, var slíkur vitnisburður ikki hvønndagskostur. Hann var so sjálvsamur, so ektaður, so reinur.

Hon taldist millum nakrar av teimum gomlu føroyingunum, sum til dagligt ikki søgdu frá viðurskiftinum við Guð, men goymdu hetta í loynikamarinum sum nakað heilagt, sum ein trúnaður millum tey og Guð; tó visti tú, at innast inni í mongum teirra búði tað, sum vanliga var nevnt stór guðsfrykt.

Hendan dagin avdúkaði hon hvussu fast og djúpt hetta sat í teimum. Hesin vitnisburður hennara hevði sera sterkt árin á meg. Eingin ivi um, at ta løtuna høvdu vit bæði varhugan av, at vit sóust ikki aftur her á foldum.

Á veg út aftur mátti eg ásanna, at hóast hvørki telefon, el ella nakrir hentleikar, sum annars vóru í flest øllum húsum tá, funnust undir hennara lágu lon, var tann heimligi hugnin yvir hesi smáttu og nøgdsemi inni har, nógv størri enn hjá mongum av okkum, sum høvdu so nógv meira av tí, sum tíðin hevði við sær.

Tað var viðsorgblíðni eg lat ta grønu úthurðina aftur eftir mær. Á veg oman frá húsum hennara segði eg viðmeg sjálvan:

– Ja, nú hevur tú mist nakað, sum tú avgjørt kemur at sakna, men sum tú ikki sær virðið í fyrr enn tað ikki er longur.

Tá ið eg kom heimaftur til Føroya, hvíldi hon millum fedrarnar í kirkjugarðinum.



Fólk kundu ikki koma uttan um, at leggja merki til, tá ið hon tosaði ella fekst við eitthvørt. Málburður hennara var egin, somuleiðis atburður hennara. Hon brúkti sjálvsom orð og bar tey fram á serstakan hátt. Tók altíð rívan til, ongantíð við ljótum orðum, men við margháttligum orðalagi og vendingum





Fyrst búði hon hon her.........



.....men tað gjørdist ov ófriðaligt, so hon flutti í lágu lonina til høgru á myndini



Hús hennara niðri við støðna hómast aftan fyri neystini